Góðu foreldur og avvarðandi hjá næmingum í 9.flokki í skúlunum í Tórshavnar kommunu

Seinasti skúladagur hjá næmingunum nærkast í hvørjum, og hesa tíðina á hvørjum ári verður tosað aftur og fram um, hvussu hetta skal skipast. Næmingarnir gleða seg til dagin, og tað gera vit í skúlanum eisini, tí dagurin plagar at vera bæði stuttligur og hugnaligur.

Siðvenjurnar á skúlunum eru ymiskar, og ymiskt er, hvat skúlarnir bjóða næmingunum henda seinasta skúladagin. Men endamálið er altíð, at hava eina góða og hugnaliga løtu saman, har vit uppliva næmingarnar og eru saman við teimum í øðrvísi kørmum enn vanligt.

Seinastu árini hava vit tó lagt til merkis, at næmingarnir hava ikki ordiliga tíð at dvølja í samveruni í skúlanum, tí tey skulu víðari í leigað høli, sum eru trupul at fáa fatur í og kostnaðarmikil. Eitt annað er eitt bál í Sandagerði.

Bálið er ein leivd frá gamla studentaskúlanum í Hoydølum, sum fólkaskúlanæmingar hava yvirtikið. Fyrr vóru tað tískil eldri næmingar, sum vóru í Sandagerði, men studentarnir eru ikki har longur. Seinastu árini hevur tískil einki skipað uppsýn verið við bálinum í Sandagerði, tað eru næmingarnir í 9.árg. sjálvir, ið hava orðnað fyri.

Hesum gera vit eina roynd at koma til lívs, tí hetta eru ikki tryggastu umstøður, næmingarnir eru í.

Síðsti skúladagur í ár er 17.mai, og skúlarnir í Tórshavn, Argjum og Hoyvík fara at skipa fyri einum øðrvísi skúladegi 16. mai, sum endar við einari rúsfríari veitslu um kvøldið í heimaskúlanum.

Vit í Skúlanum við Løgmannabreyt bjóða okkara næmingum í endaveitslu hóskvøldið 16.mai frá kl. 18.00-22.00. Vit bjóða næmingunum til ein góðan døgurða, og annars skipa næmingar saman við foreldraráðnum fyri at veitslan verður hugnalig, við tónleiki og undirhaldi

Sum er, verður einki bál í Sandagerði. Tað eru myndugleikarnir, Tórshavnar kommuna saman við SSP og skúlarnir samdir um. Tað ber ikki til at tendra stórt bál, og ongan ábyrgdara at hava.

Skúlarnir og SSP vóna, at vit á henda hátt hava fokus á tann góða felagsskapin uttan rús.

Vit ynskja, at tit foreldur stuðla okkum. Tað gera tit við at bakka upp um tiltakið og hjálpa okkum við t.d. at fáa eina tónleikaframførslu ella annað undirhald til veitsluna 16.mai.

Blíðar heilsanir

Drós Sveinsdóttir SSP umboð á Skúlanum við Løgmannabreyt